LM-099/2023

Fylgiskjal 77

Annika Petersen

Fra: Óli Andrias Reinert á Geilini <oligeilini@yahoo.com>
Sendt: 23. februar 2024 14:45
Til: VMR-Journal
Emne: Uppskotið um lóg um burðardygga ferðavinnu

Góðan dagin.

Eg havi eisini hug at gera onkra viðmerking til lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnu.

Eg eri samdur við landstýrismanninum, tá hann sigur, at føroyingar eiga at hava rætt til gongd í haga og í fjøru uttan at gjalda og uttan fyrst at spyrja bøndur ella jarðareigarar um loyvi. Kortini haldi eg tað vera rætt, at vegleiðingar verða gjørdar fyri hvussu fólk eiga at bera seg at, tá tey fara í fjøruna ella í hagan. Hetta merkir millum annað, at tað kunnu vera dagar, har tað ikki er rætt at fara í hagan sum einstaklingur ella í bólki. Her hugsi eg um fjallgongu og annað virksemi, sum kann verða í haganum onkrar dagar í árinum og sum ger tað, at óviðkomandi helst skulu halda seg burtur.

Annars haldi eg, at hesin rættur hjá føroyingum til gongd í haga ikki neyðturviliga eigur at tvinnast saman við eina lóg um ferðavinnu. Tað hevði kanska verið ruddiligari, um hesin rættur varð staðfestur í eini aðrari lóg - kanska einari hagalóg ella nátturulóg.

Hinvegin haldi eg tað vera týdningarmikið, at hesin rættur verður staðfestur í lóg. Tað kann væl hugsast ein støða, (og sjálvur haldi eg, tað í grundini so smátt er í fer við at henda) at jørð verður keypt upp av fólki, sum ikki býr á staðnum, og skal tað verða soleiðis, at fólk skulu spyrja jarðareigarar ella bøndur um loyvi at fara í hagan, so missir bygdarfólkið, sum býr á staðnum, rættin til ta náttúru, ið annars liggur til bygdina. Festini kunnu nú eisini seljast, og mær vitandi er einki krav um búðstaðarskyldu. Tað kann tí verða til tað, at onkur, sum býr í Sumba, skal avgera um fólk kunnu fara í hagan í Svínoy, ella øvugt. Hetta kann ikki vera rætt, og tí er umráðandi, at rætturin til gongd í haga og í fjøruni verður staðfestur í lóg.

Hetta reisir so aftur spurningin, hvørji tey lokalu eru. Tað stutta svarið er bygdarfólkið, og harímillum eru vanliga eisini jarðareigarar og bøndur. Vit kunnu tó av røttum spyrja, um bøndur og jarðareigarar, ið ikki búgva á staðnum, og sum kanska sjálvdan eru í bygdini, kunnu roknast fyri at vera lokal. Eg nevni hetta, tí tað verður nógv tosað um, at bøndur og jarðareigarar skulu hava eitt orð at siga, nú ferðavinnan skal skipast. Sjálvur haldi eg, at bøndur og jarðareigarar skulu hava eitt orð at siga, tí ferðavinnan má verða stýrd lokalt; annars kann hon slíta ov nógv upp á bygdarlívið og trivnaðin í bygdini. Tað er bara ikki líkamikið, um tað eru bøndur og jarðareigarar, sum sjálvir eru partur av bygdini, ið taka avgerð um ferðavinnuna, ella tað eru bøndur og jarðareigarar, ið fyri tað mesta búgva aðrastaðni, ið taka avgerðirnar. Eru tað avbygdafólk, ið taka avgerðirnar, so er tað ikki, tey lokalu, ið stýra. Tað er tí umráðandi, at bygdin framvegis verður nevnd í lógartekstinum.

So havi eg eitt lítið hjartasuff, sum kanska ikki hevur verið tosað so nógv um. Tað verður nevnt, at ikki er loyvt at fara í hagan við hundi uttan í landbúnaðarørindum.

Hatta eigur at verða strikað úr lógini.

Í Svínoy verður nærum ógjørligt at fara ein túr við hundinum uttan at bróta lógina. Heldur skuldi staðið okkurt líknandi sum hetta, at fólk hava ábyrgd av sínum hundi og eiga at syrgja fyri, at hann ikki ger skaða í haganum.

Tað kundi verið annað at sagt um lógaruppskotið, men nú gongur tíðin til viðmerkingar undan. Eg vil kortini upplýsa, at eg eri svínoyingur og eisini sjálvur jarðareigari. Mín uppfatan av ognarlutinum av uttangarðsjørð er kanska øðrvísi enn hjá onkrum øðrum. Eg haldi ikki, at eg kann rokna hagan sum mína ogn á sama hátt sum eini sethús ella ein urtagarð, hóast eg havi nøkur lunnindi í haganum. Uttangarðsjørðin hevur eisini altíð verið skipað í samstarvi við onnur, og hesi lunnindi geva mær eisini rætt til at fyriskipa nøkur ting í haganum saman við hinum ánarunum. Náttúruna kann eg tó ikki taka patent uppá, og tí vóni eg, at rætturin hjá føroyingum at njóta náttúruna undir tí

LM-099/2023

, byrgd, sum fylgir við, verður staðfestur í lóg. Um tað skal gerast í hesari lógini um burðardygga ferðavinnu, skal eg lata verða ósagt, men umráðandi er, at hesi rættindi verða tryggjað.

Sólin sendir hesa løtu sínar fjálgu strálur inn í stovuna. Tindarnir standa reystir í sólskininum, og tað er fyri mær, sum syngur hagin um vaknandi vár og minniligar løtur millum hagasóljur og syngjandi heiðafugl á flogi. Eg havi hug at fara út at njóta sólina og várið, nú dagarnir alsamt ljósna eftir vetrarblund.

Blíðar heilsur

Óli A. Reinert á Geilini
Svínoyingur

Sendt fra Yahoo Mail på Android